# Klub Sosialurin og starvsfólk á v

**Seinasta leygardag vóru haldarar, sum vóru nóg skjótir at tekna seg og starvsfólk á Sosialinum við makum, á útferð í skotska høvuðsstaðnum, Edinburg. Málið við ferðini var at síggja nakað av hesum søguríka býi og annars at "shoppa", sum konufólkini rópa tað**

ÚTFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Vilmund Jacbosen*

Á øðrum túrinum á nýggju farleiðini hjá Atlantsflogi millum Vágar og Edinburg vóru flestu setrini í flogfarinum bíløgd til Klub Sosialin, sum eru haldarar hjá Sosialinum. Við í ferðalagnum hendan dagin vóru eisini 29 starvsfólk og makar hjá starvsfólki á Sosialinum.

Seinastu árini hevur verið fastur táttur hjá Sosialinum at gera eina árliga útferð vestur í Vágar tíðliga á sumri. Á hesum ferðum hevur verið gingið um dalar og fjøll. Um kvøldið hevur verið óføra gott "kalt" borð á Hotel Vágum – við góðum undirhaldi, og síðan hava starvsfólkini við makum hugnað sær við dansi og gist á hotellinum um náttina.

Sum árini eru liðin, eru hesir túrar vorðnir so nógvir, at neyvan nakar "pakki" er eftir, sum Sosialurin ikki hevur roynt.

Hetta hava verið frálíkir túrar, sum vit øll minnast aftur á við gleði og takksemi.

## Klub Sosialurin og starvsfólk

Í ár avgjørdi tí leiðslan á Sosialinum saman við starvsfólki at gera eina ferð til Edinburg, nú Atlantsflog er farið undir nýggja rutu millum Vágar og skotska høvuðsstaðin.

Klub Sosialurin er eisini "stovnaður", og í hesum sambandi bjóðaði Sosialurin "gomlum" eins og nýggjum haldarum at verða við á hesi ferðini – fyri ein tilboðsprís.

Stórur áhugi var millum haldarar at sleppa við til Edinburg, og á skrivstovuni hjá Sosialinum siga tey, at tað eisini vóru fleiri, ið teknaðu seg sum haldarar undan fráferðini og tískil fingu høvi at sleppa við Klub Sosialinum til Edinburg.

So stórur var áhugin, at tað tíverri vóru nøkur, sum høvdu teknað seg sum haldarar, men sum kortini ikki sluppu við hesaferð. Tey fáa so høvi eina aðru ferð, nú tey eru vorðin "limir" í Klub Sosialinum.

Onkur haldari helt fyri á ferðini, at Klub Sosialurin átti at gjørt fleiri slíkar túrar, og hendan áheitanin er við hesum farin víðari til marknaðardeildina og leiðsluna á Sosialinum.

Og hvør veit, um Klub Sosialurin ikki fer at skipa fyri øðrum tiltøkum av líknandi slagi?

Vit, sum starvast her, vilja øll, at tað skal loysa seg at vera haldari av okkara blaði!




*Her eru flestu haldararnir, sum vóru við í ferðini, savnaðir frammanfyri Edinburg Castle – á veg aftur í bussin. Onkur vantar tó á myndini*



*Magnus Gunnarsson prátar við ferðaleiðara og bussførara*



*Hóast annað knæið nýliga er skift, stóð ikki á at vinna niðanaftur brekkuna. Annelisa fekk ferðina í føðingardagsgávu*



*Jóhanna, sum starvast á skrivstovuni hjá*

## Sight-Seeing

Klub Sosialurin og starvsfólk við makum fóru hendan leygardagin úr Vágum klokkan 9.15 og lendu í Edinburg Airport umleið ein tíma og eitt korter seinni.

Av flogvøllinum fóru vit í tveir bussar; ein bussur, sum Aberfoyle Coaches í Edinburg eigur, fór avstað við haldarunum saman við ferðaleiðaranum, Maju Jackson, sum veit óføra nógv at siga frá um gamla, skotska høvuðsstaðin. Klub Sosialurin koyrdi ígjøgnum býin, og har fingu tey eina holla kunning um kendu og áhugaverdu støðini í býnum.

Starvsfólkini hjá Sosialinum fóru við sínum makum í ein annan buss, sum Douglas McKay eigur. Hóast stundir ikki høvdu verið til at fáa fatur á serstøkum ferðaleiðara til hendan bussin, var bussførarin sjálvur óførur at greiða frá teimum mest týðandi støðunum á veg inn í og gjøgnum býin.

Í bussinum útaftur á flogvøllin høvdu vit ferðaleiðara við okkum, sum greiddi okkum frá ymiskum, ið vit ikki høvdu fingið at vita á ferðini um morgunin.

Sum fyrraparturin leið, steðgaðu báðir bussarnir við endan av gøtuni, Royal Mile, har Edinburg Castle liggur hægst uppi á Castle Hill.

Hóast nógvir elligamlir, søguligir og serstakliga